**Uppskot 19.02.08**

# Námsskipan

Ìskoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði

## 1.0 Innleiðing

**Námsskipanin fyri ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði er gjørd sambært**

- Løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum
- Kunngerð nr. XX frá XX. mars 2008 um ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði
- Kunngerð nr. 62 frá 23. apríl 2003 um próvtøku við útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum
- Útbúgvingin er sett at vera ½ ársverk ella 30 ECTS[1] stig og fevnir um eitt ár. Útbúgvingin er býtt upp í 3 lestrareindir
- Útbúgvingin gevur rætt til heitið Bachelor í sjúkrarøktarfrøði, enska navnið er Bachelor of Science (BSc) in Nursing

## 2.0 Endamál

**Endamálið við ískoytisútbúgvingini til bachelor í sjúkrarøktarfrøði er, at lesandi eftir lokna útbúgving hevur**

- Førleika í sjúkrarøktaryrkinum sum vísindagrein
- Ástøðiliga uppstiging av sjúkrarøktargreinaligu grundútbúgvingini og royndar- og vitanargrundarlagi sjúkrarøktarfrøðingsins frá starvsroyndum
- Lestrarfyrireikandi og upptøkugevandi førleikar til master- og kandidatútbúgvingar
- Førleikar til at skilja granskingarverkætlanir og sjálv/ur at luttaka í menningarverkætlanum

## 3.0 Skipan og innihald

Ískoytisútbúgvingin er býtt upp í 3 eindir sum ávíkavist eru 6, 9 og 15 ECTS stig

<u>Stk. 2.Eind 1, 6 ECTS stig:</u> Lesandi ognar sær grundleggjandi kunnleika og háttalagsligar førleikar í mun til vitan, vísindi og gransking á vísindaligum stigi og ognar sær førleika í mun til eina vísindaliga/akademiska tilgongd til sjúkrarøktaryrkið.

<u>Stk. 3.Eind 2, 9 ECTS stig:</u> Er valfrí eind. Í valfría partinum kunnu lesandi velja ymisk klinisk sjúkrarøktarfaklig økið. Eisini ogna lesandi sær kunnleika í kunningarfrøði/-tøkni.

<u>Stk. 4. Eind 3, 15 ECTS stig:</u> Í arbeiðinum við bachelorverkætlanini, sum er 15 ECTS stig, skal tann lesandi vinna sær førleika innan sjúkrarøktarfakligt menningararbeiði. Í verkætlanini verður viðgjørdur ein sjálvvaldur spurningur við evni úr kliniskari sjúkrarøkt og við nýtslu av vísindaligum háttalag. Verkevnið skal góðkennast av skúlanum.

## 4.0 Undirvísingar- og arbeiðshættir í útbúgvingini

Lestrarhættirnir vera tillagaðir fakliga økinum undirvíst verður í. Skift verður ímillum framløgur, fyrilestrar, kjak í plenum og bólkakjak. Ein stórur partur av undirvísingini er lagdur til rættis sum verkætlanararbeiði (problemorienterað projektarbeiði). Hetta er ein arbeiðsháttur, sum mennir førleikan at arbeiða vísindaligt. Í verkætlanararbeiðnum fær lesandi vitan um og hegni til at nýta ymisk amboð, ið eru tengd at tí vísindaliga arbeiðshættium - td. at spurdómsavklára, at leita eftir bókmentum, at seta seg inn í ymisk ástøði og háttaløg, at greina, at kjakast, at gera niðurstøður og síggja evni úr nýggjum sjórnarhorni.

Í undirvísingini er KT brúkt bæði sum amboð, námsfrøðiligur háttur og kunningarmiðil.

KT førleiki verður mettur á sama hátt sum lesi,- skrivi- og rokniførleiki. Lesandi menna førleika at leita eftir vitan í bókasavnsgrunnum, øðrum datugrunnum og á alnótini.

### 5.0 Lestrarskipan

| sep okt nov des | Feb Mar | apr mai jun |
|---|---|---|
| Grundlegjjandi eind<br>6 ECTS | Valfrí eind<br>9 ECST | Bachelorverkætlan<br>15 ECTS |

# 5.1 Yvirlit yvir lestrarætlan

Eind 1: Grundleggjandi eind. Vísindaástøði og granskingarháttalagsfrøði.

### Endamál

- At lesandi ogna sær grundleggjandi kunnleika og háttalagsligar førleikar í mun til vitan, vísindi og gransking á vísindaligum stigi
- At lesandi fáa førleika í mun til eina vísindaliga/akademiska tilgongd til sjúkrarøktaryrkið
- At lesandi nemur sær førleika so at hon/hann kann fara undir eina fráfaringarritgerð á bachelorstigi

| Tema | Ástøðilig undirvísing | Lestrarhættir | Royndir |
|---|---|---|---|
| **Vísindaástøði**<br><br>**2 ECTS** | **Vísindaástøðiligar greinir**<br><br>**Prófførsluástøði**<br><br>**Tekstgreining**<br><br>**Bókmentaleiting** | **Framløgur**<br><br>**Fyrilestrar**<br><br>**Bólkauppgávur/**<br><br>**Bólkaframløgur** | |
| **Góðska og góðskumenning í heilsuverkinum**<br><br>**0,5 ECTS** | **Karmar fyri góðskumenning**<br><br>**Skjalfesting og góðskumenning**<br><br>**Greining av hugtakinum góðska, góðskutilgongd og evidenshugtak**<br><br>**Háttaløg til góðskumenning** | **do** | |
| **Verkætlanararbeiði og verkætlanarstýring**<br><br>**1 ECTS** | **Verkætlanararbeiði**<br><br>**Grundstøðislutir í verkætlanararbeiðinum**<br><br>**Høvuðstilrættalegging av verkætlanum** | **Framløgur/ fyrilestrar**<br>**Verkætlanararbeiði í bólkum** | |
| **Gransking og granskingarháttalags-frøði**<br><br>**2,5 ECTS** | **Granskingartilgongd**<br><br>**Granskingarsløg og sett góðskukrøv**<br><br>**Innleiðsla til háttaløg til innsavnan av data**<br><br>**Innleiðsla til ymisk háttaløg til handfaring og greining av data** | **Framløgur/fyrilestrar**<br>**Kjak í plenum**<br><br>**Opponering**<br><br>**Verkætlanararbeiði í bólkum** | **Innanhýsis roynd**<br><br>**Skrivlig bólkauppgáv u við framløgu og opponering**<br><br>**Meting: Staðið/ikki staðið** |

### Faklýsingar
Staðfesting av fakum í útbúgvingini: sjá skema omanfyri á síðu 3

Pensum og krav til bókmentir er minst 100 síður fyri hvørt ECTS-stig, í alt minst 3000 síður fyri alla útbúgvingina.

Neyvari faklýsing og pensum verður lýst í lestrarætlanini fyri ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði.

## Endamál innan
### Vísindaástøði
At tann lesandi mennir førleikar til at kunna arbeiða vísindaliga við fakligum spurningum og kunna grundgeva fyri fakligum sjónarmiðum á einum akademiskum stigi.
Góðska og góðskumenning

At tann lesandi nemur sær kunnleikar um hugtøk innan góðskumenning og háttaløg at kunna skilja og fremja sjúkrarøktarligt menningararbeiði

### Verkætlanararbeiði og verkætlanarstýring
At tann lesandi nemur sær fatan fyri teimum týdningarmestu hugtøkunum, ástøðunum og háttaløgunum innan akademiskt verkætlanararbeiði.

At tann lesandi fær kunnleika til, hvussu verkætlanir/ritgerðir verða settar í gongd, verða framdar og lagdar fram

### Gransking og granskingarháttalagsfrøði
At tann lesandi fær yvirlit yvir tær ymsu háttalagsligu tilgongdirnar til gransking innan sjúkrarøktarliga økið.
At tann lesandi fær venjing í at flyta vísindaástøði til verkliga nýtilig granskingaramboð.
Eind 2: Valfrí eind

Skipað verður fyri skeiðum, sum viðgera ymisk sjúkrarøktarfakliga relevant evnir. Evnini verða ymisk frá tíð til aðra. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin skipar í summum førum fyri skeiðum í samstarvi við aðrar sjúkrarøktarfrøðiskúlar/ -fakultet. Ætlanin er, at henda undirvísingin mest fer fram sum fjarundirvísing um netið.

- Lesandi velur evni í valfríu eindini við endan av eind 1
- Eind 2 verður mett við innanhýsis roynd
- Nærri lýsing av eind 2 liggur klár í heyst

### Eind 3: Bachelorritgerðin
Í eind 3 ger lesandi sína bachelorritgerð. Skipað verður fyri einum vikuskeiði sum stigtøka til ritgerðararbeiðið. Harumframt verður ein verkætlanarvika í granskingarháttalagi, sum verður skipað sum ‘workshop’ har lesandi arbeiður við háttalagi í mun til bachelorverkætlanina.

Umframt hetta stendur tí lesandi í boði vegleiðing eftir galdandi reglum.

Í arbeiðnum við bachelorverkætlanini skal lesandi ogna sær førleika innan sjúkrarøktarfakligt menningararbeiði. Í verkætlanini verður viðgjørdur ein sjálvvaldur spurdómur úr sjúkrarøkt við nýtslu av vísindaligum háttalag. Verkevnið skal góðkennast av skúlanum og kann gerast í samarbeiði við eitt kliniskt undirvísingarstað.

## 6.0 Royndir

Í ískoytisútbúgvingini í sjúkrarøktarfrøði eru 2 innanhýsis og 1 uttanhýsis roynd.

Innanhýsis royndirnar verða mettar av lærara ella av lærara og innanhýsis prúvdómara. Uttanhýsis royndin verða mettar av próvhoyrara og próvdómara tilnevndur av Mentamálaráðnum.

Royndirnar verða mettar eftir 13 stiganum ella staðið/ikki staðið, samanber Kunngerðina um karakterstigan og aðra próvdøming nr. 59 frá 13. mei 1997, seinast broytt við Kunngerð nr. 62 frá 23. apríl 2003. Karakterurin 6 krevst fyri at standa royndina.

Royndirnar eru á føroyskum. Roknað verður við, at lesandi dugir at stava og orða seg í mun til føroyskar rættskrivingarreglur og at nýta rætta fakterminologi. Førleikin hjá lesandi at stavseta og málbera seg verður bert mettur í bachlorverkætlanini, tó soleiðis at fakliga innihaldið vigar mest.

Rektarin kann annars, har viðurskiftini gera tað møguligt, loyva lesandi, sum ynskir tað, at fara til roynd á einum fremmandamáli.

Royndirnar kunnu skipast sum einstaklinga- ella bólkaroyndir. Í seinna førinum tó soleiðis at tryggja verður, at hvør lesandi verður dømdur sær. Um fleiri lesandi hava arbeitt saman um uppgávuna, skal tað tilskilast hvønn/hvørjar part/ar tann einstaki lesandi hevur ábyrgd av, og hvør/jir part/ar er/u felags. Teir einkultu partarnir skulu kunnu dømast sær.

Í útbúgvingini kann tó ein innanhýsisroynd verða gjørd sum bólkaroynd við felags døming.

Í mesta lagið 4 lesandi kunnu luttaka í eini bólkaroynd.

Royndirnar verða mettar eftir hvør teirra uppgávukrøvum.

Rektarin kann í serligum føri gera undatak frá, hvussu nógv lesandi kunnu luttaka í eini bólkaroynd.

Lesandi er automatisk innstillað til allar innanhýsis- og uttanhýsisroyndir. Frámelding til royndir og avlevering av uppgávum skulu fylgja innanhýsisreglum skúlans. Lesandi, sum ikki fer til roynd vegna sjúku, skal skjalfesta sjúkrameldingina við læknaváttan.

### 1. Eind

Innanhýsis roynd í vísindaástøði og granskingarháttlagi. Royndin er ein skrivlig bólkauppgávu við framløgu og opponering og verður mett sum staðið/ikki staðið.

### 2. Eind

Innanhýsis roynd í valda evninum. Royndin er ein skrivlig bólkauppgávu við framløgu og opponering og verður mett sum staðið/ikki staðið.

### 3. Eind

## Bachelorritgerðin

Royndin er skrivlig einstaklinga ella bólka bachelorverkætlan. Munnliga próvhoyringin kann vera í bólki ella einstaklinga.Í bachelorverkætlanini skal lesandi vísa evni at velja burturúr, avmarka og viðgera sjúkrarøktarfakligan spurdóm og nýta viðkomandi vísindaligt ástøði og háttalag.

Skrivliga verkætlanin og munnliga prúvtøkan verða mett samlað í mun til galdandi uppgávukrøv.

Bachelorverkætlanin telur 15 ECTS-stig

Royndin verður mett eftir 13 stiganum

## 6.1 Almennar reglur fyri próvtøku

Treytin fyri at fara til uttanhýsis royndina er, at lesandi hava tikið lut í innanhýsis royndum í undanfarnum eindum.

Skúlin kann gera undantøk frá hesum báðum reglum um serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Treytin fyri at enda bachelorverkætlanina er, at lesandi hevur staðið allar undanfarnu royndirnar. Lesandi kann fara til somu próvtøku 3 ferð. Bert í serligum førum ber til at fara upp til próvtøku 4. og 5. ferð. Um royndin er staðin, kann hon ikki gerast umaftur.

Skúlin kann gera undantøk frá tíðarfreistini til luttøku í hvørji einstakari roynd um serlig viðurskifti gera seg galdandi.

## 6.2 Tillutan av ECTS-stigum

ECTS-stig verða tillutaðið tí lesandi aftaná hvørja eind við støði í luttøku í undirvísingini, uppgávum, innanhýsis- og uttanhýsis royndum, tá ið krøvini til fakini eru staðin. Hesi krøv eru lýst í teimum einstøku lestrarætlanunum.

## 6.3 Kæruviðurskifti

Ræturin til at kæra er staðfestur í Kunngerð nr. 62 frá 23. apríl 2003 um próvtøku við útbúgvingina av sjúkrarøktarfrøðingum.

Kærur um royndir ella aðra døming, sum er partur av próvtøkuni verða av lesandi latnar rektaranum. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin og vera latin inn í seinasta lagi 2 vikur aftaná, at dømingin er kunngjørd.

## 6.4 Endurroynd og sjúkraroynd

Um lesandi ikki stendur eina roynd, kann hann fara til roynd í fylgjandi eind, ella tá ið skúlin ásetur tíðina. Reglurnar fyri vanligu royndina eru eisini galdandi fyri endurroyndina.

Skúlin ásetur tíðina fyri sjúkraroynd. Reglurnar fyri vanligu royndina eru eisini galdandi fyri sjúkraroyndina.

Læknaváttan er kravd til sjúkraroynd

## 7.0 Góðskriving

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya ger av, eftir ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri gera av,

at útbúgvingarpartar, sum lesandi hevur staðið eftir ásettum reglum fyri eina aðra framhaldsútbúgving, heilt ella lutvíst kunnu koma í staðin fyri samsvarandi útbúgvingarpartar. Avgerðin verður tikin við støði í einari fakligari meting av javnvirðinum millum viðkomandi útbúgvingarpartar.